# Alzheimer tók Alice

**Heimskenda bókin um 50 ára gomlu Alice, sum fánar burtur av Alzheimer, er nú komin á donskum**

**BÓK**
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Altjóða Alzheimerdagur er í dag, og kring allan heim verður varpað ljós á evnið á ymsar mátar. Í USA er ein tann mest eftirspurdi fyrilestrahaldarin um døpru sjúkuna heilagranskarin Lisa Genova. Tað var nevniliga hon, sum í 2007 skrivaði heimskendu bókina *Still Alice,* sum líka síðani hevur ligið á amerikansku metsølulistunum.

### Minnið hvørvir

Sermerkta bókin um, hvussu omma rithøvundan, Alice, fánaði burtur eftir bert tveimum árum, tá hon fekk Alzheimer, er nú komin á donskum við heitinum *Stadig Alice.* Og eisini frá donskum ummælarum fær bókin nú bestu ummæli. Eitt nú metir ummælarin á Politiken, May Schack,



*Heilagranskarin Lisa Genova fór undir at skriva bókina, tá omma hennara fekk staðfest Alzheimer bert 50 ára gomul*

*Stadig Alice* vera so sannførandi, at øll, ið hava Alzheimer sjúkuna tætt at sær, eiga at vísa bókini ans.

Sum 50 ára gomul er høvuðspersónurin Alice á toppinum í síni karrieru sum professari í sálarfrøði á Harvard Universitetinum. Ein dagin, hon skal halda fyrilestur, hevur hon gloymt, hvat evnið er, sjálvt um hon júst hevður lisið sínar notir ígjøgnum. Og fimm minuttir eftir, at hon hevur heilsað uppá ein mann á eini móttøku, hevur hon gloymt, at hon nakrantíð hevur sæð hann.

Í fyrstuni ristir hon hendingarnar av sær og heldur tað man vera strongd ella skiftisárini, sum gera hana so gloymska. Hon fer allíkavæl til lækna, og í einum sera upplýsandi kapitli fáa vit innlit í, hvussu slíkar kanningar ganga fyri seg. Diagnosan er presenil Alzheimer, men fyribils klárar Alice seg. Men hóast Alice annars er væl fyri mentalt og intellektuelt, streingja spurningarnar seg á: nær skal hon fortelja manninum, børnunum og arbeiðsplássinum um sjúkuna?

### Skilur onki

Styrkin í bókini er mátin, hon lýsir, hvussu tað kennist hjá tí dementa at liva í eini støðu, har tú ikki skilir, hví fólk rundan um teg reagera, sum tey gera.

Sum tá Alice einaferð er á fakligum fundi á Harvard, har tey luttakandi vita um hennara sjúku. Eftir ein av fyrilestrunum kemur Alice við eini viðkomandi og skilagóðari viðmerking, sum øll taka til eftirtektar. Fimm minuttir seinni kemur hon við somu viðmerking, og nú verða fólk illa við og hyggja niður, meðan tey skunda sær víðari við skránni. Eftir situr Alice spyrjandi og skilur ikki, starvsfelagirnir bera seg so løgið at.

Eisini støðan hjá teimum avvarðandi verður lýst óvanliga væl sambært ummælaranum á Politiken. Eitt nú hvussu tað kennist hjá manninum at vera vitni til, hvussu sjúkan stjelur alt, sum kona hansara einaferð var og til endan skal ansast, sum var hon eitt lítið barn.

### Bara nú'ið eftir

Alice missur allar sínar kognitivu førleikar eftir teimum tveimum árunum, bókin fevnir um.

Eftir tað livir hon í nú'inum. Hvat tað vil siga, hevur sanniliga fingið ein nýggjan týdning, eftir at tú hevur lisið hesa bókina, sum má hava áhuga hjá øllum, sum arbeiða við Alzheimers og dementum ella onkursvegna liva við sjúkuni í familjuni. Og hvør ger ikki tað, so gomul fólk blíva nú á døgum?, spyr ummælarin.

Bókin setur eisini spurningin, um nøkur lívsgóðska er eftir til Alice, tá hon ikki longur kennir síni nærmastu og sítt heimliga umhvørvi aftur. Svarið er eftir umstøðunum lutfalsliga lívsjáttandi.

Men tað slepst ikki undan, at Alice sjálv kennir seg burturkveistraða. Eftir hennara tykki halda sjálvt tey mest vælmeinandi og best útbúnu frástøðu til tey mentalt sjúku. Tí hevur hon gjørt eina ætlan fyri, hvussu hon skal sleppa herfrá, áðrenn myrkrið søkkur saman um hana. Ætlanina hevur hon skrivað sum eitt bræv til sín sjálvs á telduni. Trupulleikin er bara, um hon til ta tíð er før fyri at skilja og fylgja sínum egnu vegleiðingum ...




*Bókin "Stadig Alice" lýsir óvanliga væl, hvussu tað kennist hjá tí dementa ikki at skilja, hví fólk reagera, sum tey gera*

